## Ávara móti niðursparing

Danska Brúkarafelagið og Ældre Sagen ávara nú móti sonevndu niðursparingarlánunum, sum í alt størri mun verða boðin sum eitt ískoyti til pensjónsveitingar. Sagt verður, at talan kann vera um ein risikablan politikk, tí tað er ikki víst, at ætlaðu fyrimunirnir fylgja við í hesum. Víst verður á, at broytingar í skattalóggávuni ella virðisbræva- og sethúsamarknaðunum kunnu broyta myndina fullkomuliga, og tí verður mælt til, at fólk fáa sær holla ráðgeving, áðrenn tey nýta niðursparing sum eitt ískoyti til pensjóns- ella almannaveiting.

## Nýtti Muhammed-tekningar at trýsta við

Fleiri donsk feløg, teirra millum B&O og F.L. Smidth, vórðu í vár offur fyri trýsti, har ein maður – allarhelst búsitandi á Fjóni vildi noyða feløgini at rinda sær pening. Aftur fyri skuldi maðurin lova, at hann ikki vildi keta feløgini saman við gøluni um Muhammed-tekningarnar. Danska løgreglan hevur kannað málið, sum í løtuni fær eina løgfrøðiliga viðgerð. Spurningurin er, maðurin skal ákærast fyri ítøkiligar hóttanir, ella um talan bert um fjákuta skriving til virkisleiðslurnar, staðfestir løgreglan í samrøðu við BT.

# Fiskaskræða og grót eru luksus vørur í Knightsbridge

**Íslendsku hjúnini Magnus og Dagmar hava í handlinum Design Center Knightsbridge víst á, at til ber at hugsa nýtt innan útflutningsvinnuna, í teirra lítla handli í einum av fínastu grannaløgunum í London selja tey íslendskt luksus til bretar, amerikumenn og arabarar.**




*Millum lukusvørurnar í Design Center Knightsbridge er eisini turrur fiskur*



*Alskyns prýðislutir eru til sølu í Designa Center Knightsbridge*

FUNKY FAROE ISLANDS
*Orð og myndir: Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mitt í sera fína býarpartinum í London, Knightsbridge liggur lítli íslendski handilin Design Center Knightsbridge, eini fittlig handilshøli í tveimum hæddum, á tremur við luksusvørum og listaverkum. Tað eru hjúnini Magnus og Dagmar, ið eiga og reka handilin, ið lat upp fyri einum góðum ári síðan, og sambært hjúnunum gongur væl, og ein støðugur vøkstur í søluni boðar frá, at handilin í longdini fer at bera seg.

Design Center Knightsbridge var mánakvøldið í farnu viku karmur um samkomu fyri føroysku luttakararnar á ráðstevnuni "At fóta sær í Lodon", orsøkin til at júst hesin handil var karmur fyrstu samkomuna í London, var ikki trupul at skilja. Handilin er dømið um áræðið og nýhugsan, og um nakað heilt serligt íslendskt, ið hevur megnað at fóta sær í London.

Í einum grannalagið har íbúðirnar ofta kostað £4-5 milliónir, er tað djarvt bara at seta seg fyri eini húsaleigu. Men Knightsbridge Design Center er ein djørv verkætlan. Handilin selur listaverk, møblar, prýðislutir og mangt annað. Her er ikki talan um hópframleiðslu, men um heilt serligar lutir. M.a. hevur handilin eitt stórt úrvæl av møblum og øðrum lutum, ið eru klæddir við fiskaskræðu. Her vóru sofur og stólar, men eisini lyklaringar, taskur og annað tilíkt.

Magnus greiddi frá, at ætlanin handan handilin var at bjóða góðsku handverk úr Íslandi til vælbjargaðar keyparar í London. Flestu viðskiftafólkini eru úr grannalagnum, men her koma eisini nógvir ríkir amerikumenn og arabarar á gátt.

Magnus hevur royndir sum sølumaður av tólum til flakavirkir í Íslandi, meðan konan hevur arbeitt við listavinnuni í Íslandi. Magnus er hálvur onglendingur, og tey høvdu hug at flyta til London og byrja henda handil, og so varð gjørt.

Í byrjanini var nærum alt í Design Center Knightsbridge íslendsk framleiðsla men, alt fleiri bretsk listafólk eru sloppin framat. Flestu vørurnar í handlinum eru dýrar, t.d. borðið, ið vit ótu pinnamat av, á prísskeltinum stóð £16.950, borðplátan var gjørt úr sera gomlum træið úr, ið við tíðini var vorðið harðari enn grót.

Fyri fýra mánaðum síðan byrjaðu tey at selja grót. Ein vinmaður Magnusar, skeyt upp, at tey fóru at selja grót, tí pussaðir steinar av ymiskum slagi eru vælumtóktir prýðislutir. Hetta hevur víst seg, at vera ein væl umtókt vøra, og grót í ymiskum støddum, slagi og formi er vorið ein alt størri partur av søluni hjá Desing Center Knightsbridge.

Umframt allar hinar luksusvørurnar var tað eitt, ið fangaði eyguni hjá fleiri av føroyingunum, tað var turri fiskurin, ið tey høvdu til sølu á diskinum.

# Teitur fekk ikki visum

**Teitur varð noyddur at avlýsa sjey av konsertunum á konsertferð síni í USA, áðrenn hann endiliga slapp inn í landið. Amerikansku innflytingar-myndugleikarnir brúktu yvir 5 mánaðir at avgreiða umsóknina um at leingja visumið hjá Teiti.**



TÓNLEIKAVINNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í mai gekk arbeiðsvisumið hjá Teiti í USA út, og longu áðrenn hetta var umboðsmaðurin hjá Teiti farin undir at fáa visumið longt soleiðis, at konsertferðin í USA kundi byrja rættstundis 6. september. Men sum tíðin nærkaðist, var enn einki svar komið frá amerikansku innflytingar-myndugleikunum. Umboðsmaðurin ringdi dagliga, lobbyistar innan tónleikavinnuna royndu at arbeiða fyri at seta gongd í málið, og spælistøðini, har Teitur skuldi spæla, sendu áheitanir til innflytingar-myndugleikarnar. Men 6. september var einki svar komið, og Teitur noyddist at avlýsa fyrstu konsertina. Av tí at svarið frá myndugleikunum kundi koma hvønn dag, so vóru konsertirnar avlýstar í síðstu løtu ein fyri og onnur eftir. Ikki fyrr enn níggju dagar og sjey konsertir seinni var visumið hjá Teiti klárt. Bólkurin hjá Teiti amerikanskt føddi Mikael Blak og amerikumaðurin Derek Murphy vóru longu í USA og báðir høvdu amerikonsk pass og nýttust tí ikki eitt visum. So teir brúktu teir níggju dagarnar, meðan teir bíðaðu eftir Teiti at spæla saman við svianum Tobias Frøbjerg og donsku songkvinnuni Tina Dico, ið vóru við sum upphiting fyri Teit og sum tóku yvir, tá høvuðsnavnið ikki kom fram.

Á ráðstevnuni í London í farnu viku prátaðu vit við Teit um avlýsingarnar, hann segði at hetta var sera irriterandi, og eisini keðiligt fyri hansara sølufremjan av nýggju fløguni í USA. Ein royndur tónleikafyriskipari og plátufelagsmaður, ið luttók á ráðstevnuni, segði við Sosialin, at hetta var ikki ein óvanlig støða. Amerikansku myndugleikarnir høvdu gjørt tílíkt í nógv ár. Hann segði, at ráðini, ið hann hevði fingið fyri nógvum árum síðan, tá hann fyrstu ferð skipaði fyri konsertferð til USA, vóru, at tú skuldi skipa fyri eini konsert, ið tú ætlaði at avlýsa ein mánað fyri fyrstu veruligu konsertina, so vóru visumini vanliga klár, tá tú skuldi brúka tey.

Kristian Blak, ið hevur skipað fyri tiltøkum í Føroyum og hevur ferðast sum tónleikari uttanlands m.a. í USA, segði við Sosialin, at hann metti hetta vera ein stóran trupulleika, og í veruleikanum ein forðing hjá útlendskum tónleikarum at virka í USA. Meðan amerikanskir tónleikarar sleppa at virka í Evropa uttan forðingar.